

# Gera arbeiðið liðugt

**Ein rúgva er fingin frá hondini, men tað liggur eisini ein rúgva á láni, og Hans Pauli Strøm er fegin um at fáa møguleikan at gera arbeiðið liðugt**

NÝTT LANDSSTÝRI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað lá alla tíðina í luftini, at Hans Pauli Strøm fór at halda fram sum landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum. Men sjálvur var hann ikki vísir í sessinum.

- Javnaðarflokkurin legði alla tíðina stóran dent á at fáa júst almanna- og heilsumál at umsita í nýggja landsstýrinum, og tað er væl soleiðis, at eg hevði royndirnar og innlitið í júst hesum sessi, sigur Hans Pauli Strøm.

Ein rúgva av málum fullu burtur, tá val varð útskrivað, og hesi ætlar Hans Pauli Strøm at tríva í beinanvegin.

- Tað er greitt, at tá tað nú er ein nýggj samgonga, mugu hesi málini fáa eina nýggja politiska viðgerð, men eg rokni við, at tey flestu kunnu avgreiðast rættiliga skjótt, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann hevur góðar vónir um samstarvið, serliga innan vælferðarøkið.

- Tað er væl soleiðis, at hjørtini sláa meiri í takt hjá hesum trimum flokkunum innan júst almanna- og heilsuøkið, og tað er ein øgilig rúgva av málum, sum liggja á láni. Og eg eri sera fegin um, at fáa møguleikan at gera arbeiðið liðugt, sum eg byrjaði undir seinastu samgongu, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at á summum økjum ætla teir at bróta heilt burtur úr nýggjum. Eitt nú skal sosiallóggávan endavendast og eldraøkið kannast nærri.

- Og so skal eg eisini seta meg niður við og saman við umsitingini lýsa allar uppgávur, sum skulu loysast, og síðani saman við samgonguni raðfesta tey, sigur Hans Pauli Strøm.

*Hans Pauli Strøm heldur fram sum landsstýrismaður*



*Kristina Háfoss lovar eitt nýtt Tjóðleikahús*

**økið hava vit eina stóra uppgávu fyri frammman. Har má støðið hækka munandi, og tað skal millum annað gerast við at lyfta læraraútbúgvingina upp á kandidatstig. Eisini skulu vit hava KT nógv meiri inn í undirvísingina. Fróðskaparsetrið skal styrkjast og mennast, og støðið innan útbúgving skal hækka generelt, sigur Kristina Háfoss.**

**Men mentanin skal heldur ikki gloymast, at eitt ítøkiligt mál, sum nýggi mentamálaráðharrin longu hevur sett sær er eitt nýtt Tjóðleikahús.**

**- Mentanin hevur ikki altíð havt bestu karmarnar at arbeiða undir, og tað ætli eg mær at betra munandi, sigur ristina Háfoss, sum gleðir seg at fara til arbeiðis.**

# Heini mín fremsti ráðgevi

**Rumblið um, hvør skuldi gerast fiskimálaráðharri fyri Tjóðveldi hevur ikki ført til ringan stemning í flokkinum, sambært Torbjørn Jacobsen. - Heini verður mín fremsti ráðgevi í truplum málum, sigur hann**

NÝTT LANDSSTÝRI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Eingin greið útmelding um ein fiskidagabanka frá nýggja fiskimálaráðharranum*

Tað endaði, sum tey flestu væntaðu. Tórbjørn Jacobsen var tikin fram um Heina O. Heinesen sum fiskimálaráðharri fyri Tjóðveldi.

- Eg vil fyrst siga, at eg eri glaður fyri, at løgmaður vísti mær tað álit at lata meg umsita alt tað tilfeingi, sum er grundarlagið undir øllum tí føroyska vælferðarsamfelagnum, sigur Torbjørn Jacobsen.

Hann hevur ongar beiskar kenslur mótvegis kappingareytanum um ráðharrasessin.

- Eg havi sitið á tingi saman við Heina í nógv ár og júst hann hevur lært meg ógvuliga nógv um politiska spælið, sigur Torbjørn Jacobsen.

Hann sigur seg tó ikki skilja, at útnevningin av nýggjum fiskimálaráðharra skuldi fara fram á einum portali, sum verður umsitin av formanninum í Norðoya Sambandsfelag.

- Heini O. Heinesen hevur drúgvar royndir innan fiskivinnuøkið, og eg vænti, at hann verður mín fremsti ráðgevi í teimum truplu málum, sum altíð stinga seg upp innan økið, sigur Torbjørn Jacobsen.

Nýggi fiskimálaráðharrin vil ikki úttala seg um, hvørt settur verður á stovn ein fiskivinnubanki ella ein tilfeingisbúð.

- Fyrsta boð í øllum politiskum útmeldingum er at signalisera ein stabilitet, so vinnan kann kenna seg fullkomiliga trygga langt fram í tíðina, sigur Torbjørn Jacobsen, sum ætlar at seta eina nevnd at koma við einum uppskoti um, hvussu fiskivinnan kann liberaliserast.